## Holst fekk javnleik

Felagið hjá Christian L. Holst, Lyngby, fekk í gjár javnleik, tá teir tóku ímóti Horsens. Dysturin byrjaði við høgari leikferð, men spakuliga dalaði leikferðin, og tí gjørdist dysturin ikki serliga góður. Tað var tó Horsens, sum hevði teir størstu málmøguleikarnar, og tá eitt gott korter var eftir, vóru teir óhepnir ikki at leggja seg á odda, tá skotið frá Gilberto Macena rakti stongina. Eftir hetta hendi ikki tað stóra, og tí endaði dysturin við málleysum javnleiki. Christian Holst byrjaði á vøllinum fyri Lyngby.



## Frem vann uttan Atla

Atli Danielsen var ikki á vøllinum, tá felag hansara, Frem, tók ímóti Ølstykke í næstbestu donsku deildini um vikuskiftið. Tað sá einki serligt út hjá Frem fyrstu løtuna, tí longu eftir 20 minuttum hevði Ølstykke lagt seg fram um 2-0. Frem gavst tó ikki so, og áðrenn hálvleik vóru teir komnir upp á javnleik við tveimum málum frá Fusu Boateng. Og í 96. minutti eydnaðist Frem at avgera dystin, tá verjuspælarin Morten Hamm skoraði til 3-2, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

# KÍ trívist væl í Sarpugerði

**Fyri aðru ferð í ár fóru klaksvíkingar við sigri úr Gøtu, meðan teir í GÍ mugu**

Tað vóru lættir og fegnir

í

hóttanin av niðurflytingini

úrtøkan hjá hinum botn-

at verða avgerandi, sum nýggi álopstrumfurin Denni

andi Heðini á Lakjuni í vinstru. Eftir tvær kontra var Conteh kaldur, tá ið hann sneiddi seg leysan og legði bóltin framvið óføra

nógvir nærdystir. Klaksvíkingar við sera eyðsýnda

vøllinum royndu at spæla fótbólt í 1. hálvleiki, og tað sá ikki so galið út. Saman við Denni Conteh var Ovi Nysted hesa ferð í álopinum, meðan Paul Clapson, sum

og eisini hevur skaða at dragast við, kom á vøllin, tá ið tað restaði gott og væl

eitt korter.

Hjá GÍ var tað aftur hesa ferð stórur saknur, at liðformaðurin og generalurin

minni væl

k l a k s - víkingum, enn

skotroyndir, ið miðvallarin Sam Jacobsen stóð fyri,

fram til Christian Lundberg

teiginum var Lundberg vandamikil, og tað var onkra ferðina nær við og næstan, tá ið stríðst varð um næstu bóltarnar. Serliga var um reppið, tá ið Lundberg eftir innlegg úr høgru stakk seg fram ímillum og

runt, tá ið teir høvdu fingið fatur á bóltinum. Heldur skundaðu teir sær. Tað bar óneyvleika og nógv bólttap

innleggi í málið, men

taka seg av

veikari. Ovi Nysted varð

verjuna saman við Kaj Ennigarð. Tað gav ikki minni styrki í luftspælinum, og Jan Andreasen vísti seg aft-

hann megnaði at skava stig

Argjum gjørdu ikki hýrin í

uni var hóast tapið staðfest, at einki broyttist á stigatalvuni, tí Skála, sum kappast

einki fekk burturúr á

ingar trívast

væl í Klaksvík. Heima-





## Danska oddaliðið vil síggja føroyingar

**Tríggir føroyski spælarar fara í morgin til Randers, har teir komandi vikuna skulu venja og hyggja at umstøðunum annars**

Áhugin fyri føroyskum spælarum tykist vera alsamt vaksandi. Eftir avrikini hjá yngru landsliðnum í summar, hava fleiri útlendsk feløg sýnt áhuga fyri fleiri av yngru føroyskulandsliðsspælarunum.

Eitt úrslit av hesum er, at tríggir føroyskir spælarar í morgin fara til Randers, har teir fram til fríggjadagin skulu venja við felagnum, eins og teir fáa høvi at hyggja at umstøðunum hjá felagnum.

Jákup í Stórustovu, umboðsmaður, váttar, at talan er um Karl Løkin og Øssur Dalbúð úr NSÍ, sum saman við Oddmar Færø úr B36 fara at venja við felagnum, sum í løtuni liggur á odda í donsku superliguni.

Tað hevur ljóðað, at Bogi Løkin eisini skuldi við á ferðini, men hetta sigur Jákup í Stórustovu seg onga viðmerking hava til.